# Børn og kunningartøkni – avbjóðingar og avleiðing

**Kunningartøkni er ein sjálvsagdur partur av spælinum og sosialu samveruni millum børn. Hetta ávirkar sjálvsagt heilsuna og menningina hjá børnum. Skipað verður fyri stórari norðurlendskari ráðstevnu um børn og KT í Havn í heyst**



*– KT er gott hjá børnum, um tað verður nýtt við skili, sigur Bjørghild Djurhuus, heilsusystir*
*Savnsmyndir*

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Mp3, playstation, sms, XBOX360, snake, gameboy, Arto..

Heitini eru eins teknisk og løgin, sum tey eru fremmand fyri tey flestu omanfyri 30. Kortini eru tey ein ófrávíkiligur partur av gerandisdegnum hjá nærum øllum børnum í dag. Børnum, sum als ikki duga at ímynda sær eina tilveru, har telda ikki er í hvørjum húsi, sjónvarp á hvørjum kamari og fartelefon í hvørjum lumma.

Hesin nýggi veruleiki hevði eitt nú við sær, at seks barnasjúkrasystrar tóku stig til at skipa fyri einari ráðstevnu, har ljós verður varpað á evnið børn og KT. Tí, sum tær taka til:

- Hetta er ein veruleiki, sum vit noyðast at fyrihalda okkum til. Fyri fáum árum síðan var kunningartøkni als ikki ein partur av gerandisdegnum hjá børnum. Nú er kunningartøkni allastaðni, og tað ein sjálvsagdur partur av spælinum, sosialu samveruni og samskiftinum millum børn. Hetta hevur sjálvandi havt ávirkan á heilsuna, menningina og medferðina hjá børnum.

## Stór ráðstevna

Norðurlendska ráðstevnan, sum verður í Norðurlandahúsinum í september, ber heitið: Børn og KT – avleiðingar og avbjóðingar. Pláss verður fyri eini 400 fólkum, og ráðstevnan er ætlað øllum, sum starvast við børnum, umframt øðrum áhugaðum.

Tær seks, sum hava tikið stig til ráðstevnuna, eru nevndarlimir í áhugafelagnum hjá føroyskum barnasjúkrarøktarfrøðingum, FBS. Limirnir í felagnum arbeiða til dagligt við frískum, hóttum og sjúkum børnum, ungum og familjum teirra.

## Nýggjar avbjóðingar

Millum fyriskipararnir er Bjørghild Djurhuus, heilsusystir, sum eisini er forkvinna í áhugafelagnum. Hon sigur, at fyrireikingarbólkurin er um at koma undir land við øllum tí praktiska. Tær arbeiða á sjálvbodnum grundarlagi, og hóast tað hevur verið ómetaliga tíðar- og orkukrevjandi, hava tær kortini megnað at seta eina sera spennandi skrá saman.

Bjørghild sigur, at avbjóðingarnar hjá starvsbólkum og foreldrum, sum eru um børnini, eru broyttar nógv seinastu árini.

– Hetta er fyrstu fer hetta evnið verður viðgjørt alment her á landi. Vit, sum eru um børnini, eiga at finna javnvág millum at verða bergtikin av øllum hesum nýggja og samstundis at seta mørk, sigur Bjørghild, sum avgjørt heldur, at KT er gott hjá børnum, um tað verður nýtt við skili.

– KT er bæði mennandi og spennandi, men kann eisini vera vandamikið og forða barninum í at mennast á rættan hátt, sigur Bjørghild.

## Sum alkohol

Og hon greiðir frá, at kanningar vísa, at børn, sum ovurnýta KT, sýna ein atburð, ið minnir um alkoholismu.

-Tey leggja gerandisdagin til rættis, so tey altíð sleppa framat einari teldu. Og tey verða órólig og aggressiv, tá tey ikki sleppa. Eisini síggja vit børn, sum skikka sær serliga pent, eitt nú við at hjálpa við at taka av borðinum, fyri á tann hátt at útloysa meira teldutíð. Hesi børn eru ovur kenslulig, følin og viðbrekin, og verða meiri ella minni avbyrgd frá sosialum samanhangum og veruligum vinaløgum, sigur Bjørghild. Hon heldur tað vera óheppið, um børnini gevast við góðum frítíðarvanum, so sum ítrótti, fyri í staðin at sita einsamøll inni í alt ov nógvar tímar.

## Spennandi skrá

Fyrireikararnir siga, at tað hevur eydnast teimum at fáa eina røð av spennandi serfrøðingum við á ráðstevnuna.

Millum fyrilestrarnar verða verkstovur, har luttak-